KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 03.10.2017 kl. 17:30

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
65/17	17/00834-6	Fíggjarætlan 2018 - Klaksvíkar Býráð
66/17	17/00457-7	Frámatrikulering til grundøki / broyting í byggisamtykt fyri økispart A9
67/17	17/00768-3	Umbýti av snøklum við Helnabrekku og Nýggjaveg
68/17	17/00859-3	Umskipan uttangarðs í Mikladali
69/17	17/01026-3	Íløgu- og rakstrarstuðul ísv. nýtt róðrarneyst og bátasavn – Kl. Róðrarfelag
70/17	16/00549-21	Frágreiðing um verkætlanina, NINA við fyrispurningi um útgjald av stuðli.
71/17	17/01058-1	Uppskot til vinarbýaravtalu
72/17	12/00492-93	Avseting til reingerð – Gigni – *flyting millum konti – fyrra viðgerð*
73/17	16/00277-38	Eykajáttan til Gigni á Fornagørðum - *fyrra viðgerð*
74/17	17/00470-5	Uppnormering av Barnaverndartænastuni í Norðoyggjum - *eykajáttan - fyrra viðgerð*
75/17	17/00274-15	Dagføring av barnaverndarnevndarformanssamsýningini - Kommunustýrisskipanin – *fyrra viðgerð*
76/17	13/00768-25	Broyting av kommunustýrisskipanini - §40 Tilbúgvingarnevndin – *fyrra viðgerð*
77/17	17/00233-24	Bygningurin á Stongunum, “Gamla bollafabrikkin”, matr 163q - *eykajáttan - fyrra viðgerð*
78/17	16/00867-91	Vegir, Íløgur - 2017 - raðfesting av ymiskum arbeiðum - *eykajáttan - fyrra viðgerð*
79/17	16/00196-31	Møguligt innandura spælipláss - *eykajáttan - fyrra viðgerð*

80/17	17/00505-3	Barnatannrøktin - hølisviðurskifti - *eykajáttan - seinna viðgerð*
81/17	15/00659-22	Tørvur á nýggjum serflutningsbussi - við dagførdum upplýsingum - *eykajáttan - seinna viðgerð*

Til viðgerðar

65/17
17/00834 Fíggjarætlan 2018 - Klaksvíkar Býráð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	26.09.2017	77/17	
2 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	65/17	

Frágreiðing um málið:
Á niðanfyri standandi talvu er ein uppseting fyri fíggjarkarmin 2018 hjá Klaksvíkar kommunu. Talan er um framskrivingar av rakstrarútreiðslum og meting um inntøkur fyri 2018, ið skulu liggja til grund fyri politisku viðgerðini av fíggjarætlanini fyri 2018 hjá Klaksvíkar kommunu.

Fíggjarætlan 2018					
	Roknsk.	F.ætlan	Broytingar	Meting roknsk.	F.ætlan
1.000 kr.	2016	2017	2017	2017	2018
Rakstrarútreiðslur	169.293	175.384	1.883	177.185	180.088
Rentustuðul	3.831	4.500	-700	3.800	4.000
Rentuútreiðslur	5.695	6.200	3.500	9.600	4.400
Rakstarútreiðslur tilsamans	178.819	186.084	4.683	190.585	188.488
Rakstrarútreiðslur NBH	50.970	54.170		54.139	55.904
Rakstarútreiðslur uttantikið NBH	118.323	121.214	1.883	123.046	124.183
Persónsskattur	188.394	191.000	-9.000	200.000	200.000
Felagsskattur	17.625	12.000	-3.000	15.000	12.500
Rentuinntøkur v.m	182	100			100
Inntøkur uttan inntøkur ísbv. yvirtøku av eldraøkinum	206.201	203.100	-12.000	215.000	212.600
Skattur av eftirlønarinngjøldum	32.011	31.600	-1.000	32.600	35.186
FAS,DIS og frádráttir	12.188	12.400	-	12.400	10.867
Inntøkur í samband við yvirtøku av eldraøkinum	45.067	44.000	-1.000	45.000	46.053
Inntøkur tilsamans	251.268	247.100	-13.000	260.000	258.653
Rakstrarúrslit	72.449	61.016		69.415	70.165

Víst verður annars til skriv frá umsitingini dagfest 20-09-2017, har høvuðstølini í fíggjarkørmunum fyri 2018 eru nágreinað.

1.000 kr.	Meting roknsk. 2017	Fíggjarætlan 2018
Inntøkur	260.000	258.553
Rakstur	177.185	180.088
Rentustuðul	3.800	4.000
Rentuútreiðslur	9.600	4.500
Útreiðslur tilsamans	190.585	188.488
Rakstrarúrslit	**69.415**	**70.165**
Avdráttir		
Íløgur		

Lógargrundarlag:
Kommunulógin og roknskaparverk kommunurnar.

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Verður lagt fyri fíggjarnevndina til viðgerðar og støðutakan.

FíN 26-09-2017
Nevndin mælir til niðanfyristandandi útgangsstøði fyri fíggjarkarmin fyri fíggjarárið 2018 og beinir málið í býráðið til víðari viðgerð.

	Æ2018 (tkr.)
Inntøkur	258.000
Rakstur	179.000
	79.000
Rentustuðul	4.000
	75.000
Rentur	4.000
Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir	71.000
Avdráttir	
Íløgur	
	71.000

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Einmælt samtykt at taka undir við tí av FíN 26-09-2017 samtykta fíggjarkarminum fyri 2018 og at beina málið til víðari viðgerð á temafundum í oktober og november.

66/17
17/00457 Frámatrikulering til grundøki / broyting í byggisamtykt fyri økispart A9

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.09.2017	60/17	
2 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	66/17	

Frágreiðing um málið:
Vísandi til býráðssamtykt frá 22. juni 2017, verður málið lagt fyri nevndina aftur.

UBN 18-09-2017
Ein minniluti Kristian Eli Zachariasen og Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen mæla til at varðveita verandi økisásetingar fyri øki. Ein annar minniluti Gunnvá við Keldu og Beinir Johannesen halda fast í samtyktina í UBN 12-06-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Kristian Eli Zachariasen um at beina málið aftur í umsitingina at arbeiða víðari við. Broytingaruppskotið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

67/17
17/00768 Umbýti av snøklum við Helnabrekku og Nýggjaveg

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.09.2017	64/17	
2 Tekniska Nevnd	20.09.2017	44/17	
3 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	67/17	

Frágreiðing um málið:
Borgari eigur matr.nr. 1049e við Helnabrekku 25 og virki borgarans eigur matr.nr. 867b við Nýggjaveg 26. Eysturmarkið hjá matr.nr. 867b liggur nakað væl úti í Nýggjavegi, og tí hevur Klaksvíkar kommuna fleiri ferðir - frá skiftandi eigarum - roynt at fingið fatur á umrødda øki, tó uttan úrslit.
Samstundis eigur kommunan matr.nr. 1035a, sum liggur millum vegin og ognina hjá borgaranum við Helnabrekku.

Borgarin skjýtur nú upp makaskifti, soleiðis at kommunan fær teir uml. 160 m^2 av matr.nr. 867b úti í Nýggjaveg, og hann afturfyri fær teir 106 m^2 við Helnabrekku + asfalt lagt á teir uml. 40 m2 norðanfyri vaskaríið við Nýggjaveg.



Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Vísandi til, at kommunan í langa tíð - uttan úrslit - hevur roynt at fingið økið undir Nýggjavegi til keyps, og útfrá tí staðfesting, at umsøkjarin letur 54 m^2 meira, enn hann fær, mælir Tekniska umsiting til at taka undir við uppskotinum hjá borgaranum.

Til kunningar verður upplýst, at økið norðanfyri vaskaríið er tikið við, nú Nýggivegur bleiv asfalteraður.

UBN 18-09-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku umsiting dagfest 15-08-2017.

TN 20-09-2017:
Nevndin tekur undir við UBN 18-09-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá TN 20-09-2017 einmælt samtykt.

68/17
17/00859 Umskipan uttangarðs í Mikladali – matr. nr. 8 v.fl.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mikladalsnevndin	21.11.2017		

2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.09.2017	65/17	
3 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	68/17	

Frágreiðing um málið:
Talan er um, at 1 gyllin í Sunnnáhaga – Heimaripartur verður fluttur frá matr.nr. 8 til matr.nr. 37 í sama haga (matr.nr. 121c)



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir til at viðmæla umsóknini.
Av tí at talan er um smámunaliga umskipan og Mikladalsnevndin ikki hevur fund fyrrenn í november, verður lagt upp til, at málið verður avgreitt í býráðnum, fyri síðan at verða latið Mikladalsnevndini til kunningar.

UBN 18-09-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku umsiting dagfest 22-08-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Herfrí J. Sørensen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Tilmælið frá UBN 18-09-2017 einmælt samtykt.

69/17
17/01026 Íløgu- og rakstrarstuðul ísv. nýtt róðrarneyst og bátasavn – Kl. Róðrarfelag

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	19.09.2017	56/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	80/17	
3 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	69/17	

Frágreiðing um málið:
Kommunan hevur móttikið umsókn frá Klaksvíkar Róðrarfelag um stuðul til nýtt róðrarneyst. Samlaði íløgutørvur er mettur til uml. 28,5 mió. kr. Av hesum er bygningurin mettur til 21,1 mió. kr. *(vístverður til hjálagda tilfar).*

Felagið ynskir at samstarva við kommununa um verkætlanina, sum partvís verður fíggjað við stuðlum og óløntum arbeiði.

Ítøkiliga verður spurt um mest møguligan stuðul til íløguna og framtíðar rakstur.

Kommunan hevur áður latið treytaðar tilsagnir til verkætlanir, og tí verður skotið upp, at hetta eisini verður gjørt í hesum føri, so felagið kann hava eitt grundarlag at arbeiða víðari við at útvega stuðul til verkætlanina.

Kommununnar partur verður veittur í mun til íløguna til bygningin.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlanin

Fíggjarligar avleiðingar:
Avsetast má til stuðulin í komandi árum

Tilmæli:
Mælt verður til, at kommunan veitir treytaða tilsøgn uppá í mesta lagi 6 mió. kr., sum verður útgoldin tá verkætlanin er framd

MeN 19-09-2017
Nevndin tekur undir við tilmæli dagfest 12-09-2017.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir við MeN 19-09-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá FíN 26-09-2017 einmælt samtykt.

70/17
16/00549 Frágreiðing um verkætlanina, NINA við fyrispurningi um útgjald av stuðli.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	19.09.2017	43/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	85/17	
3 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	70/17	

Frágreiðing um málið:
Umsitingin hevur fingið frágreiðing um filmsverkætlanina, NINA, sum nú er komin væl ávegis.

Upptøkurnar til filmin (*arbeiðið í Føroyum – Mikladali og Klaksvík*) eru lidnar, og nú er klippi- og tillagingararbeiði eftir, sum verður gjørt á filmsverkstaði í Danmark.

Býráðið samtykti 23-06.2017:
1. Veitt verður tilsøgn um kr. 200.000,- sum stuðul til filmsverkætlanina,
2. Peningurin fellur til gjaldingar, tá ið verkætlanin er liðug – einaferð í 2017,
3. Peningur verður settur av serskilt til endamálið á komandi fíggjarætlan – "Filmsverkætlan, NINA"
4. Tilsøgnin stendur við til 31. des. 2017 – og verður at søkja um møguliga leingjan av freistini, um filmurin ikki er liðugur tá.

Tá ið nú allar upptøkurnar eru lidnar, verður mett, at um 80 % av filmsverkætlanini er komin í hús. Tó er atbeiðið við at klippa og tillaga filmin er eftir. Hetta arbeiðið verður neyvan liðugt í 2017, men fyrst í 2018.

Leikstjórin og framleiðslustjórin spyrja tí, um til ber at fáa stuðulin útgoldnan nú, tí hetta hevði lætt um eftirframleiðsluna av filminum. Málið verður tí lagt fyri MeN og FíN til støðutakan.

Ein møguleiki er at gjalda út 150.000 kr. nú og síðstu 50.000 kr. seint í desember 2017, treytað av støðulýsing av verkætlanini.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlanin

Fíggjarligar avleiðingar:
Avseting er til endamálið.

Tilmæli:
Nevndin verður at taka støðu til at gera tilmæli um, hvørt peningur kann verða goldin út nú – og hvørja møguliga upphædd, talan kann verða um.

MeN 19-09-2017
Nevndin mælir til, at goldið verður sambært áður settu treytum – at stuðulin verður útgoldin, tá ið verkætlanin er liðug.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við, at 150 tús. kr. verða goldnar sum forskot, treytað av at umsitingin hevur fingið útgreinað yvirlit yvir fíggjarligu støðuna og tíðarætlan fyri verkætlanina.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur undir við MeN 19-09-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Herfrí J. Sørensen) og 4 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Steinbjørn O. Jacobsen) og 1 blankari atkvøðu (Óli M. Lassen).

71/17
17/01058 Uppskot til vinarbýaravtalu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	26.09.2017	82/17	
2 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	71/17	

Frágreiðing um málið:
Vísandi til skriv frá umsitingini dagfest 21-09-2017 um møguligt vinarbýarsamstarv millum Klaksvík og Taiji.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri nevndina til støðutakan.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir við avtaluni um vinarbýarsamstarv við Taiji.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá FíN 26-09-2017 einmælt samtykt.

72/17
12/00492 Avseting til reingerð – Gigni – *flyting millum konti – fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	34/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	97/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	72/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:
Í samband við at Gigni á Skúlatrød er flutt í onnur hølir, er neyðugt at gera eina flyting millum høvuðskontur. Talan er um avsetingina til reingerð. Avsetingin til reingerð hjá Gigni á Skúlatrød hevur verið avsett undir reingerð á Skúlatrød.

Lógargrundarlag:
Sambært § 11 í løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005, um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung, ber landið allar útreiðslur sambært lógini, og stk. 2 sigur, at kommunurnar bera útreiðslurnar til viðtaluhølir hjá kommunulæknum og heilsufrøðingum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Talan er um at flyta kr. 30.000 frá kontubólki nr. 04232270032 "Reingerð skúlabygningar", standardkonta nr. 712000 "Innanh flyt í kommununi", har avsetingin sambært weblundanum í løtuni er kr. 2.488.000, og til

kontubólk nr. 02202270026 "Skúlaheilsutænastan", standardkonta nr. 712000 "Innanh flyt í kommununi", har avsetingin í løtuni er kr. 11.000, sum við hesi flyting millum kontur hækkar upp á kr. 41.000.

Av tí at talan er um flyting millum høvuðskontur, frá § 4 "Útbúgving og gransking" til § 2 "Almanna- og heilsumál", krevur henda tilmælta broyting av fíggjarætlanini fyri 2017 at verða samtykt tvær ferðir av býráðnum – í september og oktober umførunum.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til at samtykkja omanfyri nevndu flyting millum kontur á kr. 30.000 frá játtanini á Skúlatrød til reingerð skúlabygningar og til játtanina til Skúlaheilsutænastuna til tess at fíggja reingerðingina.

TrN B&U 19-09-2017
Nenvdin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12-09-17.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir TrN B&U 19-09-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá FíN 26-09-2017 einmælt samtykt.

73/17
16/00277 Eykajáttan til Gigni á Fornagørðum - *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	35/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	99/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	73/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:
Vísandi til skriv frá umsitingini dagfest 12-09-2017, har útreiðslur í samband við húsaleigu og reingerð eru nágreinaðar.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsuskipan fyri børn og ung § 11, stk. 2.
«*Kommunurnar bera útreiðslurnar til viðtaluhøli hjá kommunulæknum og heilsufrøðingum*»

Løgtingslóg um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003, sigur í § 41, at *"kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk"*.

Fíggjarligar avleiðingar:
Sambært leigusáttmálanum er húsaleigan og leiga av skrivstovumøblum fyri 2017 tilsamans kr. 159.116 og kostnaðurin av reingerð áleið kr. 100.000. Tilsamans fyri húsaleigu og reingerð eru avsettar kr. 155.000. Kostnaðurin av húsaleigu, leigu av skrivstovumøblum og reingerð er kr. 259.116. Tað vil siga, at tað er avsett kr. 104.116 ov lítið á fíggjarætlanini fyri 2017.

Tilmæli:
Vegna ov lítla avseting til húsaleigu og reingerð hjá Gigni – heilsufrøði til børn & ung, verður við hesum biðið um eina eykajáttan á kr. 104.000.

TrN B&U 19-09-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12.09.17.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 100 tús. kr. til Smábarna Gigni, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til. 4 mió.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

74/17
17/00470 Uppnormering av Barnaverndartænastuni í Norðoyggjum - *eykajáttan - fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	37/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	95/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	74/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:
Vísandi til skriv frá umsitingini dagfest 12-09-2017 um uppnormering av Barnaverndartænastuni við tilsamans 15 tímum um vikuna.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003, sigur í § 41, at *"kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk"*.

Fíggjarligar avleiðingar:
Kostnaðurin av at uppnormera trý av starvsfólkunum á Barnaverndartænastuni frá 30 tímum um vikuna til 35 tímar um vikuna frá 01.10.2017 er í inniverandi fíggjarári: kr. 39.287,76.

Tilmæli:

Vísandi til skriv dagfest 12-09-2017, verður mælt til at uppnormera Barnaverndartænastuna í Norðoyggjum við 15 tímum um vikuna, deilt á 5 tímar um vikuna til 3 starvsfólk. Kostnaðurin av hesum er kr. 39.287,76 frá 1. oktober 2017 til 31. desember 2017, sum mælt verður til at fíggja við eykajáttan.

TrN B&U 19-09-2017
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12-09-2017.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 40 tús. kr. til BVT, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til. 4 mió.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

75/17
17/00274 Dagføring av barnaverndarnevndarformanssamsýningini - Kommunustýrisskipanin – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	40/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	94/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	75/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:
Vísandi til skriv frá umsitingini dagfest 13-09-2017 um tørv og grundarlag fyri dagføring av barnaverndarnevndarformanssamsýningini.

Lógargrundarlag:
Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 2017, er ásett í § 4 stk. 7, at "fyri luttøku á fundum í barnaverndarnevndum fáa limir og varalimir samsýning sambært reglunum í kommunustýrislógini."

Sostatt er greitt, at barnaverndarnevndin skal samsýnast eftir reglunum í kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

Í nevndu kunngerð er ásett í § 7 um nevndarformenn, at "bý- ella bygda(r)ráðið kann áseta í kommunustýrisskipanina, at formenn í føstu nevndunum skulu fáa fasta formanssamsýning. Verður ásett, at føst formanssamsýning skal veitast, skal eisini upphæddin á føstu samsýningini ásetast.

Víðari stendur í stk. 2, at "árliga fasta samsýningin til einstøku nevndarformenninar kann í mesta lagi verða 2 ferðir nevndarsamsýningina sambært § 6, stk. 2, sbr. tó stk. 4."

§ 6 er ásett, at "nevndarsamsýning fyri einstøku fundirnar fylgir reglunum í § 2, stk. 2."

Víðari stendur í stk. 2, at "árliga fasta samsýningin, ið er treytað av íbúgvaratalinum í kommununi tann 1. januar í valárinum, tá ið avgerð sambært § 1 verður tikin, til einstøku nevndarlimirnar kann í mesta lagi verða henda:

4) 5.000 -9.999 íbúgvar: 15 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 2"

§ 2, stk. 2, nr. 2 í kunngerðini er soljóðandi:

Fundarsamsýning

"Samsýningin fyri fundir sambært stk. 1 er tann til eina og hvørja tíð galdandi takstur hjá landinum, sum ásett í avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Felag Tænastumanna Landsins. Tann 1. oktober 2013 vóru takstirnir hesir:

1) Fundur styttri enn 3 tímar kr. 530.
2) Fundur millum 3 og 5 tímar kr. 1.060.
3) Fundur longri enn 5 tímar kr. 1.590."

Sostatt er upphæddin, sum faldast skal við: kr. 1.060, sum sambært dagførda almenna yvirlitinum í dag er dagført at vera kr. 1.104.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samlaða roknistykkið verður sostatt, at føst formanssamsýning kann verða upp til hesa upphædd:
2 x 15 x 1.104,- = kr. 33.120,- um árið, sum gevur kr. 2.760,- kr. um mánaðin.
Hetta er upphæddin, sum formenn og forkvinnur í føstu býráðsnevndunum í dag fáa.

Í sambandi við Barnaverndarnevndina verður tó mælt til at hækka samsýningina til kr. 24.840 um árið, sum svarar til 2.070 um mánaðin. Hetta merkir ein fíggjarligan meirkostnað á kr. 8.844 um árið ella kr. 737 um mánaðin.

Næstformaðurin í Barnaverndarnevndini fær óbroytt dupulta fundarsamsýning, tá ið hann avloysir forkvinnuna.

Tilmæli:
Vísandi til, at Barnaverndarnevndin hevur umleið 17 fundir um árið (3. hvørja viku), og at talan er um eitt ógvuliga álvarsamt og tíðarkrevjandi málsøki, verður mælt til, at samsýningin til forkvinnuna í nevndini verður hækkað úr verandi upphædd á kr. 16.000,- um árið (1.333,- um mánaðin) upp í kr. 24.840,- um árið (kr. 2.070,- um mánaðin). Upphæddin kemur fram við at falda 1,5 x 15 x 1.104,-).

TrN B&U 19-09-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 13-09-17.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir við TrN B&U 19-09-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá FíN 26-09-2017 einmælt samtykt.

76/17
13/00768 Broyting av kommunustýrisskipanini - §40 Tilbúgvingarnevndin – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	26.09.2017	101/17	
2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	76/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:
Gjørt verður vart við, at tilmælið er dagført millum viðgerð hjá TN 20-09-2017 og FíN og BýR.

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 20. sept. málið (nr. 36/17 á TN-skránni), sí viðtøku niðanfyri.
Ein meiriluti Óli M. Lassen, Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen og Beinta Klakstein tekur undir við tilmælinum. Ein minniluti, Atli Steinbjørn Justinussen og Steinbjørn O. Jacobsen mælir til, at minnilutin í býráðnum fær ein lim í nevndina.

Síðani hava borgarstjórarnir í tilbúgvingarsamstarvinum fundast um víðari arbeiðið at gera reglugerð fyri tilbúgvingina og eitt yvirlit, sum vísir minsta krav til útgerð á ymsu støðunum. Hesin parturin av málinum verður lagdur fyri viðkomandi nevndir og býráð í oktober umfarinum, og tá verða fleiri skjøl við í málinum.

Kommunurnar í samstarvinum hava í dag fingið uppskot til reglugerð og minstakravslistan (sí viðheftu undirskjøl) sendandi til viðgerðar í kommunustýrunum.

Sum kunnugt varð lagt upp til, at nevndir og býráð bert viðgjørdu broytingina av kommunustýrisskipanini (§ 40) í september umfarinum. Nú er tó møguligt, at fíggjarnevndin og býráðið eisini viðgera uppskotið til reglugerð fyri tilbúgvingina og minstakravslistan (Skjal C). Upplýst verður, at ein uppstigan av útgerðini hjá Sløkkiliðnum til minstakravið er leysliga mett at kosta 1,7 mió. kr. Í løtuni ber ikki til at siga, um upphæddin kann raðfestast yvir t.d. tvey fíggjarár.

Annars vísandi til skriv frá umsitingini dagfest 20-09-2017.

Lógargrundarlag:
Tilbúgvingarlógin (Ll. nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving), § 12, stk. 1-5.
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu, 4. mai 2017, § 40 (Tilbúgvingarnevndin)
Samsýningar sambært kommunustýrislógini (kunngerð nr. 93 frá 9. sept. 2014)

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið hevur lítlar ella ongar avleiðingar fyri fíggjarætlanina fyri 2017.

(Borgarstjórarnir, ið gerast limir í nevndini fáa ikki samsýning fyri hetta nevndararbeiðið vísandi til § 10, stk. 6 í kunngerð nr. 93 frá 9. sept. 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini. Sostatt skuldi broytingin ikki havt stórvegis fíggjarligar avleiðingar við sær – í øllum førum ikki ísv. samsýningar).

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til í fyrsta lagi at taka støðu til uppskotnu broyttu orðingarnar um tilbúgvingarnevnd í kommunustýrisskipan kommununnar, petti 1, 2, og 3.

Og í øðrum lagi verður mælt býráðnum til at velja limir í tilbúgvingarnevndina.

Tilmæli til FíN og BýR:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu broyttu orðingarnar um tilbúgvingarnevnd í kommunustýrisskipan kommununnar, petti 1, 2, og 3.
Mælt verður eisini til, at fíggjarnevndin og býráðið viðgera/taka støðu til reglugerðina og minstakravslistan.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir við broyttu orðingunum um tilbúgvingarnevnd í kommunustýrisskipanini. Nevndin tekur eisini undir við uppskotinum til reglugerð og minstakravslista.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur somuleiðis undir við minnilutanum í TN 20-09-2017, um at býráðsminnilutin verður umboðaður í tilbúgvingarnevndini.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

77/17
17/00233 Bygningurin á Stongunum, "Gamla bollafabrikkin", matr 163q – *eykajáttan – fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	18.09.2017	28/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	83/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	77/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:
Vísst verður til samtykt frá apríl 2017, tá UBN, HaVN og FíN samtyktu: *"Nevndin mælir til, at kommunan tekur upp samráðingar við eigarnar um framtíðar loysn av bygninginum".*

Umsitingin hevur, saman við formanninum í Havna- og Vinnunevndin, í summar haft fundir við leigarnar av skúrunum og hevur lagt uppskot fyri teir um, at kommunan "yvirtekur" ábyrgdina av bygninginum, soleiðis at umsitingargrunnurin verður uppleystur.

Ein meting er gjørd av at fáa bygningin í nýtiligan stand, har serliga tekjan má skiftast. Herumframt má bygningurin tryggjast móti stormi til komandi vetur. Mett verður, at tørvur er á uml. 1,5 mió. kr. tilsamans.

Hereftir verða leigusáttmálarnir dagførdir og tillagaðir, so leigan kann verða sett í mun til kostnaðin av umvæling og trygging.

Mett verður, at neyðugt er við eini árligari leigu uppá minst kr. 100,- pr. kvm/árliga. Samla vídd er 683 kvm, so hetta gevur eina inntøku uppá kr. 68.000,- pr ár. at dekka trygging og viðlíkahald. Størsti skúrur er 52 kvm til støddar.

Løgfrøðingur hevur kannað málið og mælir til, at ískoyti verður sett í verandi sáttmálar.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin peningur er avsettur til umbygging o.a., so tørvur er á eykajáttan í ár uppá kr. 500.000,- at tryggja til veturin.

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri avvarandi nevndir til støðutakan.

HaVN 18-09-2017
Nevndin tekur undir við at vetrartryggja bygningin og finna neyðuga pening innan verandi játtan og um neyðugt eykajáttan.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 500 túsund. kr. til "Bollafabrikkina", ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. kr. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til 4 mió. kr.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Óli M. Lassen og Atli S. Justinussen) og 4 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

78/17
16/00867 Vegir, Íløgur - 2017 - raðfesting av ymiskum arbeiðum - *eykajáttan - fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	20.09.2017	38/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	103/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	78/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:

Málið um raðfesting av játtan til Vegir, Íløgur hevur fingið fleiri viðgerðir í árinum, og Tekniska nevnd hevur samtykt nakrar broytingar av fyrstu raðfestingini av ymiskum arbeiðum, sum vóru samtykt í februar 2017.

Víst verður til skriv frá umsitingini dagfest 12-09-2017 við yvirliti yvir broytingar.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Staðfest verður nú, at samlaða játtanin til Vegir Íløgur kemur ikki at halda.
Tí er neyðugt við hesum eykajáttanum, vísandi til oman fyri standandi frágreiðing:

1. Til keyp av ognini Garðavegur 61: kr. 1.050.000,-
2. Til vega arbeiðið á Húsum: kr. 1.200.000,-*

*Kostnaðurin av at asfaltera nýggja vegin á Húsum er sambært tilboð uml. 1,0 mió. kr., og Landsverk vil gjalda 100 tkr. Onnur rest arbeiði eru mett at kosta tilsamans 300 tkr. Hetta gevur tilsamans 1,2 mió. kr.

Tilmæli:
Tekniska Umsiting fer við hesum at heita á viðkomandi nevndir og býráð um at játta kr. 2.250.000,- til Vegir Íløgur. Sambært hesum hækkar játtanin til Vegir Íløgur úr kr. 6.000.000,- til kr. 8.250.000,-, og verður eykajáttanin at fíggja av tøkum peningi hjá kommununi.

TN 20-09-2017:
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 2,25 mió. kr. til Vegir, Íløga, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til. 4 mió.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

79/17
16/00196 Møguligt innandura spælipláss - *eykajáttan - fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	26.09.2017	107/17	
2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	79/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini dagfest 15-09-2017 um møguleikarnar hjá kommununi at fremja verkætlanina sjálv.

Lógargrundarlag:
Onki.

Fíggjarligar avleiðingar:
Eykajáttan 2 milliónir fíggja av staðfestum meirinntøkum í ár.

Flyta millum konto:
1 mió av Fastognir
1 mió av Spillivatn

Eykajáttan í alt 4 mió.

Tilmæli:
Mælt verður til, at peningur verður játtaður sum eykajáttan vísandi til omanfyristandandi, og at kommunan fremur verkætlanin sjálv.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 1 mió. kr. til Spælilandið, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, mælir til, at málið verður tikið við í fíggjarætlanararbeiðið fyri 2018.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Steinbjørn O. Jacobsen um at koyra málið aftur í umsitingina. Tað fall við 5 atkvøðum fyri (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen) og 6 atkvøðum ímóti (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen).

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

80/17
17/00505 Barnatannrøktin - hølisviðurskifti – eykajáttan - seinna viðgerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	13.06.2017	31/17	
2 Fíggjarnevndin	20.06.2017	70/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	22.06.2017	55/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	03.10.2017	80/17	

Frágreiðing um málið:
Talan er um seinnu viðgerð, málið varð samtykt við fyrru viðgerð í býráðnum 22-06-2017.

TrN B&U 13-06-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 07-06-17.

FíN 20-06-2017
Nevndin tekur undir við B&U 13-06-2017.

Býráðsins samtykt 22-06-2017
Tilmælið frá FíN 20-06-2017 einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

81/17
15/00659 Tørvur á nýggjum serflutningsbussi - við dagførdum upplýsingum - *eykajáttan - seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	19.09.2017	14/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	98/17	
3 Klaksvíkar Býráð	03.10.2017	81/17	

Frágreiðing um málið:
Talan er um seinnu viðgerð, málið varð samtykt við fyrru viðgerð í býráðnum 22-06-2017.

Lógargrundarlag:
"Reglugerð fyri Serflutningsskipan Landsins", sum eftir umsókn frá Klaksvíkar kommunu er sett í gildi av Almannamálaráðnum, regulerar hesa skipanina.

Reglugerðin er m.a. soljóðandi:

ALMANNA – OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Grein 7

Fígging:
Serflutningsskipan landsins verður fíggjað av landskassanum, kommununum og brúkarunum. Brúkarin rindar eitt brúkaragjald á 10 kr. fyri hvønn túrin, meðan restkostnaðurin verður býttur javnt millum land og tær luttakandi kommunurnar.

Landskassaparturin verður síðan útgoldin sambært góðkendari fíggjarætlan sum eitt a conto gjald tvær ferðir um árið. Uppgerð fyri fyrstu 6 mánaðirnar skal sendast Almannamálaráðnum í seinasta lagi 10. august, meðan uppgerð fyri undanfarna ár skal verða Almannamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 1. mars.

Kommunurnar senda ein grannskoðaðan roknskap fyri hvørja serflutningsskipan sær til Almannamálaráðið innan 15. mars.

Eisini skulu kommunurnar innan 1. februar senda eina fíggjarætlan fyri næsta árið, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna.

Fíggjarligar avleiðingar:

				v/mvg	Komm/ mvg	
Bussur úr dk		483.419 kr.		604.274 kr.	513.874 kr.	
Sýn					500 kr.	
Nummarplátur					500 kr.	
Burturbeiningargjald					5.000 kr.	
Frakt					15.000 kr.	
eyka ljós					15.000 kr.	
Tilsaman					**549.874 kr.**	

Tilmæli:
Vísandi til fyrru býráðssamtyktina 22-06-2017, verður málið við hesum lagt fyri til seinnu samtykt.

TrN E&B 19-09-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagf. 13-09-2017.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir við TrN E&B 19-09-2017 og mælir til, at keypið verður fíggjað av verandi íløgujáttan, og at fleiri tilboð verða innheintað, áðrenn keypið verður framt.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá FíN 26-09-2017 einmælt samtykt.